## Keypa færri bøkur

Bókasølan í Noregi minkar støðugt, og í síðsta mánað seldu forløgini 25 prosent færri bøkur enn í sama mánað í 2008. Eitt nú minkaði sølan av føgrum bókmentum til vaksin meiri enn 25 prosent og meiri enn 26 prosent til børn. Kortini ætla tey stóru forløgini ikki at skerja talið á ætlaðum útgávum í ár, skrivar Dagsavisen. Aschehoug heldur sína ætlan fyri 2009, Gyldendal fer at skarva eitt sindur av onkrum einstøkum útgávubólki, og Kagge og dóttirfelagið Stenersen fara at geva 55 bøkur út í ár ella at kalla tað sama sum í fjør.




## Misnøgd við avgjøld

Leiðslan í SAS er misnøgd við tær veksandi útreiðslurnar av at brúka floghavnina í Kastrup, og felagið vil vera við, at vøksturin er heilt burtur úr vón og viti. Herumframt er SAS misnøgt við, at felagið verður hildið uttan fyri tingingarnar millum leiðsluna í floghavnini og Statens Luftfartsvæsen um, hvussu tey ymsu avgjøldini skulu roknast. Sambært SAS ætlar floghavnin í Kastrup at hækka avgjøldini átta prosent í einum. Felagið sigur, at hetta er tað sama, sum avgjøldini eru hækkað tey seinastu seks árini.

# Opið stríð í samgonguni um hurðina út í verðina

**Topp politikarar í Sambandsflokkinum finnast hvassliga at evropapolitikkinum hjá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í uttanlandsmálum og samgonguni**

EVROPAPOLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Edmund Joensen, løgtingsmaður og fólkatingsmaður, sigur, at Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, minnir um skarðsmenn, tá ið teir runnu eftir mánanum*

Tað er synd at siga, at samgongan dregur somu línu í spurninginum um, hvønn evropapolitikk, samgongan skal føra.

Tað varð skorið út í papp, táið Løgtingið hevði munnligar fyrispurningar á skránni í farnu viku.

Evropapolitikkurin skal vera framtíðar portur okkara út í heim, men nú hevur gamli sambandsformaðurin, Edmund Joensen, ið nú er løgtingsmaður og fólkatingsmaður, aftur fest í eitt gamalt kjak ímillum politisku flokkarnar um, hvørja leið, vit skulu ganga.

Tað gjørdi hann tá ið hann spurdi Jørgen Niclasen, landsstýrismann í uttanlandsmálum, hví hann ikki enn hevur sett tann skjótt arbeiðandi serfrøðingabólkin, sum samgongan hevur avtalað at seta at kanna greina møguleikarnar fyri tættari føroyskum tilknýti til ES - eisini møguleikan fyri at Føroyar gerast partur í ES.

Hann vil eisini hava at vita, nær arbeiðsbólkurin verður settur.

- Tað eru fimm mánaðir síðani, at samgongan varð skipað og enn hevur Jørgen Niclasen enn onki gjørt fyri at fáa gongd á kanningarnar um føroyskt tilknýti til ES.

Hann rør eisini framundir, at tað er brot á samgonguskjalið at onki er gjørt við málið.

### Stórt arbeiði

Jørgen Niclasen sigur, at starvsfólk í uttanríkisráðnum hevur lagt stórt arbeiðið at fyrireika arbeiðið so væl sum gjørligt, so at vit fáa eitt úrslit, sum vit kunnu brúka til nakað.

Annars er tað ikki fyrrenn á nýggjárinum, at peningur var tøkur til at seta kanningina í verk fyri.

Annars vísir Jørgen Niclasen, at tað tók tíð at finna tey røttu fólkini.

Men tað gongur ikki long tíð, til arbeiðsbólkurin kann gerast.

Poul Michelsen í Fólkaflokkinum heldur, at tað er eitt egotripp hjá Edmund Joensen at seta ein spurning sum hendan, ella er hann bara úti eftir at lima Føroyar inn í ES – undir Danmark.

Hann tekur annars fult undir við arbeiðnum hjá samgonguni.

### Jørgen onki at gera

Magni Laksáfoss í Sambandsflokkinum sigur, at talan er tvørtur ímóti um ein sera viðkomandi spurning.

- ES hevur avgerandi týdning fyri at menna Føroyar og Jørgen Niclasen hevur eina stóra umsiting, men onki at gera uttan at fyrireika hetta arbeiðið. Tað einasta, hann hevur gjørt av øðrum, er at ferðast til Liberia og hesin arbeiðsbólkurin skuldi langt síðani verið avgreiddur.

Hann legði eisini dent á, at ES spurningurin hevur so stóran týdning fyri Sambandsflokkin, at var ES kanningin ikki við í samgonguskjalinum, hevði Sambandsflokkurin heldur ikki verið við í samgonguni.

Heðin Zachariasen sá ongan trupulleika í at lýsa ES spurningin og tí tekur hann undir.

Jákup Mikkelsen er samdur í, at ein politisk avgerð skal takast um evropapolitikkin, men tað er onki galið at kanna málið væl ov virðiliga og tað er hetta, sum samgongan ætlar.

### Tómt tos

Edmund Joensen kallaði frágreiðingina hjá Jørgen Niclasen fyri tað beru undanførslur og onki uttan tómt tos.

- Hetta eru nýggjar undanførslur, tí var vilji til tað, kundi arbeiðsbólkurin langt síðani verðið settur burtur av teirri játtan, sum uttanríkisráðið hevur frammanundan og við tí arbeiðssetningi, sum longu stendur í samgonguskjalinum.

Trupulleikin er, at málið er ikki raðfest, heldur hann.

Hann fýlist á, at samgongan bara arbeiðir við EFTA málinum, men fullkomiliga gloymir ES málið.

Hann undraðist turrisliga, at landstýrið ikki skuldi klára at seta ein slíkan arbeiðsbólk upp á fimm mánaðir, tí tað er nógv longri enn tað tekur at fylla ein trolara í Barentshavinum.

Hann kom eisini við nøkrum ið kundi tulkast sum ein lítil hóttan.

- Fáa vit ikki framt tey mál, ið eru avtalað í samgonguskjalinum, fáa vit ein trupulleika.

Hann heldur eisini lítið um EFTA, tí hann kallaði EFTA fyri eina deyða sild, ella ein avtakandi mána, sum er upp á tað allar minsta.

Og Jørgen Niclasen minnir mest um skarðsmenn, tá ið teir runnu eftir mánanum, helt Edmund Joensen.

Jørgen Niclasen er ørkymlaður av, at Sambandsflokkurin gongur í tveimum, men hann letur ongan iva vera um, at hann fer at halda samgonguskjalið.